FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Vælkomin

## Fyrilestur um skiftisnámsfrøði

Sonja Olsen

Hvør eri eg?

Hvørji eru tit?

Hvat kunnu tit læra av hesum fyrilestri?

# Fyrilesturin fer at snúgva seg um:

- Hvat eru skiftir?
- Hvørja ávirkan hava skiftir á børn?
- Økjan av kompleksiti í nútíðarsamfelagnum og tess ávirkan á barnsins skiftir
- Hvat hevur námsfrøðiligan týdning í skiftum hjá børnum?

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Hvat eru skiftir?



- Stór
- Miðal
- Smá

# Hvat hevur námsfrøðiligan týdning í skiftum hjá børnum?

- Skipan av arbeiði, námsfrøði og í mun til hvussu tit hugsa um barnsins læring og trivna
- At læring og menning er kontinuerlig (stigvøkstur)
- At trivnaður eisini handlar um at hyggja afturá
- At eitt skifti ikki bert hendir í tí skiftið hendir, men er nakað sum hendir ígjøgnum eina tíð, í ymiskum kontekstum, systemum og í ymiskum tilgongdum til arbeiðið
- Barnið skal tillaga seg til nakað nýtt, ofta eitt nýtt umhvørvi
- Eitt skifti kann viðføra eina stagnering í læringini og menningini í eina tíð og barnið kann missa álit á seg sjálvt í mun til læring
- Eitt skifti kann viðføra nógva nýggja læring grundað á nýggjar lærings - og menningar møguleikar í nýggjum umhvørvi

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Skipan av arbeiði, námsfrøði og í mun til hvussu tit hugsa um barnsins læring og trivna

Kontinuitetur/diskontinuitetur?

- Skipan av arbeiði
- Skipan av námsfrøði
- Barnsins læring

# At læring og menning er kontinuerlig

Læring

Læring

Dagstovnur.

- Kenslulig menning
- Persónlig menning
- Heilsa kroppur og rørsla(herundir eisini fín og grovmotorisk menning)
- Sosial menning
- Kreativ menning (herundir eisini mentan)
- Náttúra og science
- Støddfrøðiligt grundarstøði
- Málmenning og byrjunnar skrivimenning

- Holistiska menning

Forskúlakunngerðin

- Samvera og samstarv
- Mál og málmenning
- Rørsla og motorikkur
- Sosialir førleikar
- Undran, forvitni og skapanargleði
- Handaverk og list
- Støddfrøði og náttúra
- at nýta náttúruna í læringini

- Holistiska menning

1-3 fl.

- Føroyskt
- Støddfrøði,
- Kristinkunnleiki
- Ítróttur
- Myndlist og tónleikur,
- Heimstaðarlæra

- Holistiska menning

Trivnaður

Trivnaður

# Eitt skifti hendir ikki bert í tí sjálvt skiftið hendir, men er nakað sum hendir ígjøgnum eina tíð, í ymiskum kontekstum, systemum og í ymiskum tilgongdum til arbeiðið




(Larsen 2014)

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Barnið skal tillaga seg til nakað nýtt, ofta eitt heilt nýtt umhvørvi

Tað fragmenteraða barnið



Barnið í javnvág



Eitt skifti kann viðføra eina stagnering í læringini og menningini í ov langa tíð og barnið kann missa álit á seg sjálvt í mun til læring



Eitt skifti kann viðføra nógva nýggja læring grundað á nýggjar lærings - og menningar møguleikar í nýggjum umhvørvi



FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Tosi saman 2 og 2, í 5 min

- Tosi saman í 5 min. um tykkara áskoðanir um hetta sum eg havi greitt frá.

# Skiftir fyrr og nú

- Hvussu var tá tit vóru børn?
- Hugsaðu tykkara foreldur, starvsfólk á stovnum og skúlum um skiftir tit fóru ígjøgnum?
- Hvat halda tit kanska er broytt í mun til í dag?

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Ein nýggjur barndómur





# Vert at hava í huga

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

- Hvussu føroyingurin hugsar um normar og virðir. Tað er ikki heilt tað sama sum í t.d. Dk.
- Sambært F. Gaini, sum hevur granskað nógv í føroyskum viðurskiftum, so hevur tað føroyska samfelagið verið í eini rívandi menning fram til nú.
- Tað er í fylgi Gaini ikki nakað nýtt at samfeløg broytast. Men tað føroyska samfelagið er farið frá einum traditionellum samfelagi til eitt modernað samfelag uppá 40-50 ár, har hetta hevur tikið tvey hundrað ár í Europa. M.a. tí landið liggur so isolerað. Tvs., at tey børnini sum hava sín gerandisdag á stovni ella skúla nú um dagarnar ella eru farin víðari, hava knska langommur og langabbar sum vuksu upp í tí traditionella samfelagnum og evt. hava verið til skips ella verið arbeiðsgenta sum tannáringar.
- Samanber man við tannáringar í dag, so fyllir ítrótturin og áhugamál sera nógv og heimligu pliktirnar eru kanska ikki so stórar sum fyrr. Tvs. har eru tvær sera ymiskar áskoðanir á hugtaki barndóm og ungdóm. Faktisk var tað neyðugt fyrr, at man var barn til konfirmationsaldur, og so var man vaksin. Knøpp og sjónlig broyting. Tá skuldi man hjálpa til at forsyrgja.
- Frá at “rollan at forsyrgja” hevur fylt nógv, er nú rollan hjá foreldrum og samfelagnum at uppdraga børn sum klára seg væl sum individualistar sera týdningarmikil, hetta umfatar alla menning og kanska er sera nógv fokus á persónligu og bókligu menningina umframt tað at børn vera ment at klára seg í einum øðrum heimi enn fyrr.
- Hetta samfelags-skiftið kann gera at samfelagið ikki heilt hevur umstillað seg til nútíðina enn. Og kann hava ávirkan á hvussu td. stovnar/skúlar/starvsfólk taka nýggj ting til sín, sum koma uttan frá.

# Hugleiðing:

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

- Hvat halda tit eru tykkara áskoðanir tá tað kemur til virðir og normar í barna-uppaling ?
- Hella tit til tað nýggja ella hella tit til tað gamla?

# Primer sosialisering

- Heima
- Uppdragilsi og umsorgan (knýtt at foreldrum, systkum og familju)
- Mentan í familjuni, normar og reglar
- Er útgangspunktið fyri at læra sosialar normar og reglar



# Sekunder sosialisering

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

- Er uttanfyri heimi
- Ávirkan av normum, virðum og atferð frá námsfrøðingum, lærarar, venjarum, vinum osf.
- Lærir at vera í samfelagsins felagsskapum



# Dupult sosialisering

Sambært dagstovnalógini og fólkaskúlalógini

Báðar socialiseringar líka týdningarmiklir

„við umsorgan, í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, at menna og menta børnini á fullgóðan hátt og í samvinnu við foreldrini at geva børnunum eina kristna og siðalagsliga uppaling"

"Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini."

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA



FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA



# Firvaldarmodellin






# Hvørja ávirkan hevur samfelagið og praktikarin?

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA





# "Flótandi moderniteturin"

Z. Bauman

# Samfelagið



# Hvat kunnu tit gera í einum størri perspektivi?

- Geri eina ætlan fyri hvat børnini skulu læra/menna ígjøgnum ári. Eftirmeti ætlanina javnan, men minnist til at ting taka tíð.
- Syrgi fyri at øll børnini læra og mennast, tvs., at øll hava tørv á at fáa størri og nýggjar avbjóðingar. Hugsi t.d. ZNU inn í hesa gongd í mun til barnabólkin og hvørt einstakt barn.
- Samstarvi við næsta stað hjá barninum eftir skiftið, soleiðis at tit vita hvat hvør arbeiðir við



# Hvat kunnu tit gera í gerandisdegnum?

- Semjist um hvat og hvussu tit vilja arbeiða við børnunum.
  - Distribuerað vitan – sundurlutað vitan
- Skipi dagin:
  - Skipaðar gongdir: Tit bestemma hvat børnini arbeiða við/spæla/gera
  - Óskipaðar gongdir: men vaksin skulu altíð syrgja fyri at børnini hava góðar fortreytir fyri læru og menning.

Útgreinaðið boð uppá hvat tit kunnu gera

# Hvussu kunnu leiðarar og starvsfólk á økinum arbeiða tilvitað við skiftum tilgagns fyri børn?

- Arbeiði við skiftis-tiltøkum: Seti tykkum inní “hitt staðið” og geri nøkur av teimum somu tingunum á hvørjum staði. Tillagi so líðandi
- Arbeiði við skiftis-lutum: Leikur, kendum evnum, ymiskir lutir
- Arbeiði við skiftis-subjektur (vaksin og børn):
  - Lati børn sum kennast fylgjast í næsta stað (helst vinir)
  - Lati vaksin sum kenna barnið og sum barnið kennir fylgja við í ta nýggja staðið ta fyrstu tíðina. Tillagi so líðandi
- Arbeiði við priming events:
  - Har tit arbeiða við m.a. kreativum tiltøkum áðrenn og yvirum skiftið
  - Arbeiði við tiltøkum sum taka útgangsstøði í spæli, men á ymiskan hátt.
    - Frítt spæl
    - Lærandi spæl
    - Spælandi læra
- Samstarvi við “hitt staðið” bæði uppeftir og niðureftir
  - Vitji
  - Distribueraða vitan – sundurlutað vitan

Inndragi lærugreinar/ menningarøki

Útgangsstøði í aldri og menningarstøði

# Priming events

## Dømi:prosessin deild upp í deil-partar/aktivitetir

1. Søgan verður lisin/víst í sínum formi. Børnini spæla og spyrja nógv aftaná.
2. Børnini sleppa at tekna. Eygleið um tey tekna okkurt úr søguni. Fleiri málarí vera gjørd afturat einsæris ella í bólkum. Tað verður tosa nógv saman.
3. Tey vaksnu tosa við eitt og eitt barn, har spurt verður um tankar hjá barninum, hvønn figur barnið dámar best osv. Samtalurnar vera tiknar upp og skrivaðar niður og at enda samlaðar í eina bók. Í hesa bók tekna børnini eisini teirra besta figur og skriva navnið á figurinum niðriundir. Her tosa børn og vaksin eisini um at skriva í skúlanum osv.
4. Tosað verður um søgugongdina. Hvørt barn velur sær hvør sína scenu at tekna. Síðani tosa tey vaksnu og børnini um í hvørjari rekkjufylgju tekningarnar skulu setast saman. Hetta verður alt samla á størri ørk og collagir og verður sýnt fram fyri foreldrum. Børnini sleppa at vísa fram og fortelja um søgugongdina osv.
5. Tekningarnar vera tiknar niður og lagdar á gólvið. Børnini sleppa at tosa um søguna enn einaferð og tey leggja tekningarnar saman í rættu rekkjufylgju. Síðani fáa børnini sínar egnu tekningar og myndir við heim, eins og sína egnu bók "sjálva søguna". Alt fer heim við, har børnini aftur kunnu greiða síni familju frá um søguna og teirra upplivingar í sambandi við teirra arbeiði av søguni.
6. Ein slík gongd kann fara fram í einum skiftið ella beint undan eitt skiftið. Eitt eintak av søguni kann verður tá givið til næsta stað sum kann víðarimenna/føra gongdina.

# Kreativ tiltøk yvirum skiftið- tað potentiella rúmið hjá barninum til læru/trivna
## Vinardalurin (youtube.com)

















“Rites of Passage”

















# Hugleiðingar til tykkara

**Skiftisnámsfrøði**

- Arbeiða tit við skiftis-tiltøkum, skiftis-lutum og skiftis-subjektum? Rites de Passage?
  - Um ja, so hvussu?
  - Um nei, hví ikki?
- Arbeiða tit við priming events og barnsins potentella rúmi?
  - Um ja, so hvussu?
  - Um nei, hví ikki?

**Samstarv**

- Samstarva tit við "hitt staðið" bæði uppeftir og niðureftir
  - Um ja, so hvussu?
  - Um nei, hví ikki?
- Arbeiða tit við sundurlutaðari vitan?
  - Um ja, so hvussu?
  - Um nei, hví ikki?

# Takk fyri

Sonjao@setur.fo